# Stóratjørn – Heimsins nalvi

BOGI ELIASEN
cand.scient.pol



Góða viku aftaná at tað fréttist, at okkurt heilt stórt varð í væntu og at Stóratjørn verkætlanin hjá Jákupi á Dul Jacobsen bleiv løgd fram, er ikki annað at siga at hon hevur verið væl móttikin. Verður hugsað um aðrar størri verkætlanir og gerandisdagin annars, varð orsøk til at óttast jantulóg og mótstøðu. Men her sær út til at talan er um eina heildarverkætlan. Verkætlanin er løgd til rættis og ikki minst væl løgd fram, hevur fígging og einasta formliga bindingin til politisku skipanina, er loyvið at byggja. Men m.a. Elin Heinesen hevur víst á, at hon heldur ikki at henda ætlanin er nóg góð, at hon kundi verið gjørd nógv betri og at endin er at vit fáa ghettoir.

Talan er ikki um stuðul og ikki um at politiskir persónar eru við, og so við einum av okkara útisetum, sum hevur klára seg serliga væl, samstundis sum hann ikki hevur verið partur av føroyska gerandisdegnum. Ætlanin sær út til at hava fingið breiðan stuðul frá bæði býraði, Løgmanni og annars av teimum flestu. Sjálvandi hava onkrar, men ikki nógvar neiligar røddir verið at hoyra. Ein slík ætlan hevur við sær eitt ótrúligt framfýsni, mens samstundist elvir hon eisini til broytingar. Spurningarnir kunnu verða hvat hetta merkir fyri miðbýin í Havn og SMS, hvat tað merkir fyri økini uttanfyri Havnina, og tað sum kanska hevur verið mest umrøtt, um tað kann ávirka føroyska búskapin og elva til t.d. fløskuhálsar á handverkaraøkinum. Klaksvíkingar hava jú eisini lagt orku í at gera ein depil har norðuri nú fasta sambandi kemur.

## Fótur í hosu

Tað er eyðsæð, at ein slík ætlan eisini hevur broytingar við sær. Hetta flytir fokus frá kapping millum Miðstaðarøkið og t.d. Klaksvík og Skálafjørð, til at verða eitt sterkt økið í kapping við høvuðsstaðir í grannalondum okkara. Talan er um eina ætlan sum kann veruleikagerast, tí hon er privat. Kommunan fær ongantíð orku at standa aftan fyri eini slíkari ætlan, og neyvan landspolitiska skipanin heldur. Hetta er bert møguligt, tí ein útisetavinnulívsmaður hevur viljan, trúnna og áræði til at fara í holt við eina slíka ætlan. Hann rakar so beint í eina tíð, tá landið ikki veit hvat skal gerast fyri at fáa fólk heimaftur (brain-drain), og at Føroyar mest av øllum líkjast einum deyðssiglara í alheimsgerðini, at 2015 mál skulu konkretiserast og at uppskot til vinnupolikk er lagt fram á Tingið. Um almannakunngerðin av verkætlanini er tilvildarlig, ella bíðað hevur verið eftir røttu løtuni, er ilt at siga, men tað skerst ikki burtur, at henda ætlanin passar sum fótur í hosu til ynskir fyri menning í Tórshavnar kommunu, um privat átøk í mun til 2015 málini, vinnupolitikkin og eisini útspælini frá vinnuhúsinum.

## Slóðbrótarin

Talan er um stóra íløgu, sum kann slóða fyri at fáa váðafúsan kapital til Føroyar. Seinastu árini hava víst ein nógv størri føroyskan áhuga fyri at gera íløgur. Verkætlanin Stóratjørn kundi møguliga verið slóðbrótarin fyri at kanska serliga føroyingar sjálvir fara í gongd við bæði størri og øðrvísi verkætlanir í Føroyum. Ein slík ætlan sum hendan dregur jú nógv arbeiði til sín, og eisini uppgávur sum ikki vanliga eru í Føroyum. Tað ger tað meira áhugavert og fer eisini at verða við til at menna føroyskar førleikar, sum møguliga aftaná kunnu brúkast aðrastaðni, tí er eisini umráðandi at virkir sum skulu verða við í hesi ætlan leggja seg eftir at fáa servitan og dygdir. Men eisini gerst neyðugt at hugsa um arbeiðsmarknaðin, sum longu sær út til at hava fløskuhálsar i byggivinnuni, bæði millum økini í landinum, tí tað er lætt hjá føroyingum at fara uttanlands at arbeiða, og at tað er trupult at fáa útlenska arbeiðsmegi inn í landið. Tí er eisini neyðugt, at verkætlanin hevur stuðul í politisku skipanini.

## Føroyar á kortið

Stóratjørn setir Havnina og Føroyar á heimskortið sum eitt modernað land. Her gerst møguligt at hava eitt savnandi altjóða umhvørvi við bæði handilsdepil, hotelli, skrivstovum, frítíðartilboðum og tí tað sum altjóða vinnulívið sóknast, men kanska eisini tað sum nógvir føroyingar ynskja. Ein partur av at fáa føroyingar heimaftur, er at slíkir møguleikar eru, soleiðis at asfaltføroyingarnir fáa nøktað sín tørv.

Fólk ynskja góðar umstøður og møguleikar, og at vit umvegis kunningartøkni síggja, hvat er aðrastaðni. Tjóðskapur er ikki alt og kann eisini partvís nøktast aðrar vegir enn at flyta heimaftur. Til ber at hava samband við og fylgja væl við umvegis eina teldu, eins og at ferðamøguleikarnir eru munandi betri enn fyri fáum árum síðan. Ein partur av at taka eina útbúgving er eisin at sleppa at brúka hesa á ein nøktandi hátt. Tað kann eisini merkja, at størri krøv verða sett til umstøður uttanfyri arbeiðstíð. Við tøkni og ferðamøguleikum í dag, kann ein sum útiseti verða tætt knýttur at Føroyum, og tað setir kanska enn størri krøv fyri at fáa fólk heimaftur.

Vit mugu tó minnast til, at talan enn bert er um eina upprunaætlan, og tað er hent meira enn eina fer at ein ætlan broytist. Men við at leggja ein depil júst har, er ikki so langt til nýggju økini, samanbundin við undirsjóvartunlum, og sum heilt vist ger, at arbeiðið við føstum sambandi til Skálafjørðin gerst alt meira lokkandi. Stóratjørn fær ávirkan á føroyska kervið, tí Havnin gerst enn meira dragandi. Sambært verkætlanini er ætlanin at hava eitt virkið vinnulív á staðnum.

## Ítróttur

Leingi hevur verið arbeitt við ætlanunum um eina fótbóltshøll, sum m.a. skuldi fíggjast við UEFA peningi. Spurningurin hevur verið hvar hon skuldi vera. Jákup á Dul Jacobsen hevur einfalt bert víst, at hann byggir eina høll í Havn, so mugu hinir finna útav, um teirra skal verða í Havn ella aðra staðni. Her er at vóna, at tað arbeiði ikki steðgar og at vit fáa eina høll uttanfyri Havnina skjótast til ber. Um vit lítað aftur á longu orrustuna í sambandi við Tórsvøll og rennibreyt, so verður rennibreyt í høllini í Stórutjørn, og tí verður eisini latið upp fyri frælsum ítrótti við góðum innandura møguleikum. Hetta fer at styrkja okkara ítrótt munandi og betra um treytirnar at hava kappingar í Føroyum uttan fyri háárstíðina, tá vit hava stóran óbrúktan hotelkapasitet. Tí gerst tað meira enn nakrantíð neyðugt, at leggja seg eftir at fáa olympiska limaskapin undir land. Við tunlinum millum Havnina og Eysturoynna verður ikki langt millum Gundadal og Svangaskarð við Stórutjørn á vegnum og tí einar góðar ítróttaumstøðar á einum í vídd avmarkaðum øki.

## Styrkir Havnina

Sigast kann, at henda ætlan ger Havnina til ein nýmótans høvuðstað við tilboðum, sum tíðin í dag krevur. Hetta kann medvirkað til at vit fáa



*Verkætlanin Stóratjørn kundi møguliga verið slóðbrótarin fyri at kanska serliga føroyingar sjálvir fara í gongd við bæði størri og øðrvísi verkætlanir í Føroyum, skrivar Bogi Eliasen*